# Dúgvan vendi aftur



*Dúgvan noyddist at venda aftur til Klaksvíkar hósdagin*

**Strandfaraskipið fekk um skrúvuna og noyddist at venda aftur til Klaksvíkar hósdagin**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Tað gekk ikki sum ætlað, tá Dúgvan fór av Stongunum í Klaksvík hósdagin. Stutt aftaná fráferðina klokkan 17.20 fekk Dúgvan um skrúvuna, og hon noyddist at leggja stilt á vágni.

Har var hon liggjandi í ein hálvan tíma, til hon vendi aftur. Dúgvan kom aftur til kai um seks-tíðina, og tá fór froskmaður beinanvegin niður at loysa skrúvuna.

Hendingin órógvaði samferðsluna um Lorvíksfjørð eitt sindur, men klokkan 19.00 var alt í lagi aftur, og tá fór Dúgvan úr Klaksvík aftur, og síðani hevur hon siglt sum vanligt.

# Ætlan gerast fyri góðshavnina

**Hugskot og møguleikar eru óteljandi, og nú ætlar havnanevndin hjá Klaksvíkar kommunu at gera eina neyva ætlan fyri góðshavnina í Ánunum**

HAVNALAG
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Á nýggjárinum verður arbeiðið at fylla út í Ánunum tikið uppaftur. Tá skulu meira enn 200 fermetrar afturat fyllast út, har Klaksvíkar kommuna ger góðshavn.

Tað eru nógv hugskot um, hvat góðshavnin skal brúkast til, og Klaksvíkar kommuna eisini hevur síni hugskot.

– Vit skulu gera eina ætlan fyri góðshavnina, so vit fáa sum mest burturúr, sigur Torleif Sigurðsson, sum er formaður í havnanevndini hjá Klaksvíkar kommunu.

Í góðshavnini er ætlanin at hava kaikant, har øll skip kunnu koma at, bygningar skulu gerast á havnalagnum, og tosað verður eisini um at gerast frystitunnlar.

### Flyta virksemið av vágni

Eftir at havnaøkið inni á vágni í Klaksvík verður brúkt til fulnar, hevur Klaksvíkar kommuna sett ferð á arbeiðið við góðshavnini í Ánunum.

– Vit hava gott havnalag inn á vágni, men vit ætla ikki at gera útbyggingar har. Tað er ikki neyðugt at hava alt virksemið inni á vágni, og hóast tað hevur verið upp á tal at fylla meira út inni á vágni, so kemur tað ikki upp á í løtuni, sigur Torleif Sigurðsson.

– Hinvegin skulu vit gera eina góða góðshavn í Ánunum, har øll hugsandi skip skulu sleppa til kai, og har vit fáa eitt gott havnalag. Harafturat er tað óvanliga veðurgott, har vit gera góðshavnina.

Arbeiðið at gera góðshavn í Ánunum fer at kosta stívliga 30 milliónir krónur samanlagt.

# Betesdakórið heldur 75 ára dagin



*Betesdakórið fer leygardagin og sunnudagin at syngja í sambandi við 75 ára dagin hjá kórinum*

**Um vikuskiftið fer sangkórið í Betesda í Klaksvík at halda sín 75 ára dag. Kórið hevur virkað uttan steðg øll árini síðani 1926**

KÓRSANGUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** 1. oktober fylti sangkórið í samkomuni Betesda í Klaksvík 75 ár, og hetta vikuskiftið verður dagurin hildin.

Leygardagin klokkan 15.00 verður opið hús í Betesda, har greitt verður frá søguni hjá kórinum. Tað verður gjørt við myndum, upptøkum og øðrum. Millum annað verða upptøkur hjá manskórinum, sum vóru gjørdar í Keypmannahavn í 1946, at hoyra. Klokkan 19.00 fer kórið at syngja nakrar sangir, og greitt verður frá virkseminum hjá kórinum.

Sunnudagin kl. 18.00 fer Betesdakórið at hava sangmøti, har kórið millum annað fer at syngja verk eftir Mozart og Händel.

### Slóðbrótandi

Tað var Eliesar Poulsen, sum í 1926 tók stig til at stovna sanggkór í Betesda. Hetta gjørdist einki avmarkað upplop, tí síðani hevur sangkórið í Betesda virkað uttan steðg. Betesdakórið var tað fyrsta innan samkomurnar í Føroyum, og tí var talan um slóðbrótandi verk hjá Eliesari og hinum.

Í dag telir kórið 60 fólk, og seinastu 37 árini hevur Jógvan við Keldu verið kórleiðari.

Betesdakórið hevur fleiri ferðir verið á ferð uttanlands. Seinast var í august mánaði í ár, tá tey vitjaðu í Noregi. Ferðir eru eisini gjørdar til Danmarkar, Íslands og Sveis.

Ætlanin er, at ein fløga skal gevast út við kórinum, og hendan fløgan skal ætlandi gevast út næsta ár.

# Nú nærkast tann tíðin

Leygardagin verður farið inn í jólamánaðin, og millum annað merkir hetta, at jólaljósini verða tendrað.

Sum vant verður dúgliga stákast, nú tað av álvara er farið at stunda til jóla.

Bæði gávur og pynt eru longu at síggja í ymsu handilsgluggunum, og sjálvandi fara ymsu bý- og bygdaráðini eisini at gera sítt til, at jólamánaðin verður so hugnaligur sum gjørligt.

Havnin er einki undantak í so máta, og seinasta hond verður nú løgd á fyrireikingarnar.

Kunningarstovan hevur soleiðis boðað frá, at stóra jólatræið í Miðbýnum verður tendrað leygardagin klokkan 16.00, og sum vant verður nógv gjørt burturúr.

Sonja Klein, prestur, og Jan Christiansen, borgarstjóri, fara at flyta fram røðu, og eftir hetta fara Ung Stjørnuskot at syngja á Káta Horninum.

Samstundis boðar Kunningarstovan frá, at jólatrøini á Argjum, Hvítanesi, í Kaldbak og Norðradali verða tendrað í komandi viku.





# Ógrundað og frekt álop á Heina O.

**Tað er bæði ógrundað og frekheit uttan líka, at leggjast eftir tingmanni á tann hátt, sum gjørt varð aftan á veljarafundin í Norðurlandahúsinum, heldur Heini O. Heinesen, sum fekk sera ringt ummæli í Fregnum. Hann saknar blaðrúmd í aðrar mátar í blaðnum**

ÁLOP
*Edvard Joensen*



*Heini O. Heinesen heldur viðgerðina, hann hevur fingið eftir veljarafundin í Norðurlandahúsinum, vera bæði ógrundaða og freka uttan líka*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Norðoyatingmaður Tjóðveldisfloksins heldur seg ikki hava tað viðgerðina uppiborna, sum vikublaðið Fregnir hevur givið honum.

Tað harmar Heina O. Heinesen, tingmann Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum, almikið, at hann í Fregnum varð at kalla niðurgjørdur fyri sín lut á valfundinum í Norðurlandahúsinum beint undan fólkatingsvalinum.

Eisini vísir Heini O. Heinesen á, at tað tykist, sum hann ikki í aðrar mátar verður hidlin vera verdur at koma í blaðið. Í øllum førum hava fleiri samrøður verið millum hann og blaðið, uttan at hann er nevndur við einum orðið, hóast sjónarmið hansara verða brúkt.

– Eg veit ikki, hvussu aðrir politikara hava tað, men tað harmar meg, at míni sjónarmið verða brúkt, uttan at mítt navn verður nevnt, sigur Heini O. Heinesen.

### Heldur linjuna

Heini í Kunoy er tjóðveldismaður av gamla slagnum við báðum beinum á jørðini. Og tað ætlar hann sær eisini at vera verðandi.

Hann heldur ikki, at hann ehvur klára seg so illa í politikki. Tað metir hann heldur ikki, at veljararnir halda,

– Tað skal meira lívsvísdómur til enn bara tað, sum stendur á einum próvskjali, sigur hann og heldur, at júst hansara royndir og hansara aldur eru hansara styrki.

Tað er ikki tað, at hann kennir seg hóttan av nýggjum kreftum í flokkinum. Men hann vísir á, at nú er alt vorðið so amerikaniserað við sjónvapi og slíkum, at tað kemur meira ann uppá, hvussu ein førir seg fram, enn hvat ein førir fram.

Nú gongur væl, og so eru nógv fólk knappliga tøk, vísir Heini O, Heinesen á. Men hann var formaður floksins, eftir at tað gekk illa í 1994 og var ein av høvuðsstuðlunum til at fáa Tjóðveldisflokkin upp til tað, hann nú er. Tað var ikki lætt, og tá ráddi sanniliga um at hava jørðforbindilsi.

### Gloymska valdar

– Eg óttist eitt sindur fyri, hvat nýggir politikarar kunnu finna uppá, sigur Heini O. Heinesen, og sipar til, at tað er so skjótt at gloyma. Eingin tosar longur um, hvussu tað var, tá fiskaloysið var upp á tað ringasta í fyrru helvt av nítiárunum. Tí tey minnast tað ikki longur, sigur hann. Men vit, sum tá stóðu í heidnum stríði, vit vita, at tað kann henda aftur.

Tað er ikki vist, at tað verður populert at tosa um økisfriðingar og aðrar avmarkingar, nú alt skal snúgva seg um so nógva umsetiligheit sum gjørligt, sigur Heini O.Heinesen.

– Men eg fari so ongantíð at missa meg sjálvan burtur fyri at vinna ein stokkutan valsigur í sjónvarpi. Eg verði tann, eg eri, og tað hava veljararnir eisini givið til kennar, at teir halda vera rætt.

### Stillar uppaftur

Hóast Heini O. Heinesen ásannar, at hann nú er á tí eldra liðnum, heldur hann seg enn hava ein boðskap at bera. Og tað ætlar hann eisini.

Tað er onkur, sum hevur hug at bera tey boð, at Heini ikki ætlar at stilla uppaftur. Men tað er ikki so, sigur hann. Hann ætlar avgjørt at royna aftur, sigur hann.

Sjálvandi er tað rætt at seta nýtt fólk við alla tíðina, men tað er í so morgírugt at vilja arva faðirin, áðrenn hann er deyður, heldur Heini O. Heinesen, løgtingsmaður.

Tað hava altíð verið ávísir spenningar millum ættarlið. Eisini politiskt. Og einki løgið heldur hann vera í, at tað eisini eru tað í Tjóðveldisflokkinum.

Men haðani frá og so til ta viðferð hann sjálvur hevur fingið eftir fólkatingsvalið, heldur hann vera í so langt.

Heini O. Heinesen heldur seg ikki hava gjørt tjóðveldisflokkinum nakað ilt. Flokkurin hevði eitt rímiliga gott fólkatingsval, vísir hann á, og at hann fekk færri persónligar atkvøður nú enn til seinasta fólkatingsval, hevur sínar heilt greiður orsøkir.

Tá fólkatingsval var í 1998, var Heini formaður í flokkinum og sum slíkur eitt upplagt høvuðsvalevni.

Nú er allur bygnaðurin broyttur, og Høgni Hoydal er formaður og eisini høvuðsvalevni. So tað er greitt, at hann fær ágóðan av »formanseffektini«.

– Eitt kann eg so altíð standa við, og tað er, at mín tala er erlig, sigur Heini O. Heinesen, tingmaður Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum.





